# TÆR TÍGGJU PLÁGURNAR

- ÚTFERÐIN HJÁ ÍSRAELSFÓLKI ÚR EGYPTALANDI



EVNI AT TOSA OG HUGSA UM

## Trælir

1. Hvat heldur tú ein trælur er?
2. Heldur tú, at trælir eru til nú á døgum?
3. Nevn okkurt, sum ein trælur ger fyri harra sín.
4. Heldur tú, at tað er rættvíst, at onkur er trælur hjá einum øðrum? Hví/hví ikki?
5. Trælirnir í Egyptalandi vóru húðflongdir, um teir ikki arbeiddu nóg skjótt. Heldur tú, at hetta riggaði?
6. Hevði tú viljað haft ein træl? Hví/hví ikki?

## At vera dovin

1. Kongurin sigur, at hansara trælir eru dovnir. Greið frá, hvat tað vil siga at vera dovin.
2. Ert tú dovin til tíðir?

## Revsing

1. Gud revsar kongin. Hví heldur tú, at Gud revsar?
2. Hevur tú nakrantíð fingið eina revsing?
3. Nevn nøkur dømi um hvussu foreldur kunnu revsa børn síni.
4. Nevn nøkur dømi um hvussu vaksin kunnu revsa onnur vaksin.
5. Heldur tú, at revsing er góð? Hví/hví ikki?
6. Hevur tú nakrantíð revsað onnur?

## Plágur

1. Alt vatnið í Egyptalandi verður til blóð. Er tað ein hørð revsing? Hví/hví ikki?
2. Kunnu menniskju vera fyri uttan vatn?
3. Gud sendið froskar, mýggjabitar, flugur og ongsprettur til Egyptaland. Dámar tær hesi dýrini?
4. Gud gjørdi dýr og menniskju sjúk. Mong doyðu. Heldur tú, at tað er rættvíst? Hví/hví ikki?
5. Gud sendið hegling sum drap fólk og dýr sum vóru úti. Hevur tú upplivað ógvusligt heglingsæl?
6. Gud drap elsta sonin í øllum familjum í Egyptalandi. Heldur tú, at tað er rættvíst?
7. Hvør í flokkinum er elsti drongur í tykkara familju?